# Veteranarnir glitraðu

KÍ venjarin, Eyðun Klakstein, var bæði fegin og lættur, eftir at hansara lið hevði vunnið fyrsta landskappingardystin í ár: - Eg fegnist um, at liðið ikki varð tikið av fótum, hóast vit fingu mál ímóti okkum beinanvegin. Tað boðar frá góðum morali. Eg fegnist eisini um, at veteranarnir stóðu seg so væl, nú teir aftur vóru førir fyri at vera ímillum teir fyrstu ellivu. Jan Andreasen og Harley Bertholdsen spældu sera væl. Teir høvdu stóran týdning fyri, at tað hekk so væl saman. Ungu menninir stóðu seg eisini væl, og tað boðar frá, at breiddin á liðnum er stór.



# Hálvt marathon leygardagin

Leygardagin klokkan 17 verður startskotið til FM-kappingina í hálvum marathon latið av. Teinurin, sum er 21,1 km langur, byrjar og endar á Bursatanga. Umframt at talan er um FM-kapping, er talan eisini um opna kapping. Og tí kunnu øll tey, sum hava hug at royna seg, tekna seg til kappingina. Tilmelding fer fram á heimasíðuni, www.athletics.fo, og er evsta freist fyri hesum fríggjakvøldið.

KÍ-B71 2-1 (2-1):

# Stórur lætti í Klaksvík

*KÍ*

*B71*

**Klaksvíkingar vóru greitt omaná, men eftir misnýtt brotsspark var um reppið, at 2-1 sigurin glapp KÍ av hondum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í gjár vann KÍ fyri fyrstu ferð í átta mánaðir fulla úrtøku á heimavølli.

Síðsti sigurin undan hesum var 26. august í fjør, tá ið VB/Sumba varð sent til hús við 6-3 tapi. Síðani tá hava fýra landskappingardystir verið í Klaksvík, sum KÍ hevur fingið eitt stig burturúr við samlaða málmuninum 5-13!

At tað gongur illa at finna málið var mikukvøldið staðfesting av. KÍ var á odda 2-1 eftir 1. hálvleik. Seinna umfarið hevði heimaliðið greiða yvirvág. John Hammer rakti í stólpan, og í fleiri førum var tætt við, men í málskjóting vóru heimamenninir sørir eftir steðgin.



*Kristoffur Jakobsen og liðfelagarnir í KÍ munnu draga andan nakað lættari, eftir at tað mikukvøldið eydnaðist KÍ at vinna fyrsta heimasigurin í átta mánaðir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Misnýttu brotsspark

B71 spælararnir, sum vóru týðuliga darvaðir av at Gudmund Nielsen noyddist at fara skaddur av vølli longu eftir hálvan tíma, tóktust lítið hugaðir at leypa á, hóast teir í málum lógu undir. Miðvallarin Flavio hevði góða skotroynd, sum landsliðsmálverjin pareraði tíðliga í 1. hálvleiki, og tað var tað.

Í fimm minutta yvirtíðini, sum tóktist kennast serliga long fyri heimafólkið, var um reppið, at hálvur møguleiki stóðst til B71. Eftir langa framlegging stýrdi tryggi Milic Curcic við høvdinum bóltin aftur til Jákup Mikkelsen, sum var skjótur út og tók bóltin fyri nøsini á álopsspælara.

Serliga Símun Joensen hjá KÍ mundi kenna seg lættan. Í síðstu løtu í vanligu leiktíðini hevði hann misnýtt risa møguleika at staðfesta heimasigurin. Eftir fínt uppspæl frá Kristoffuri Jakobsen varð Kristian á Lakjuni feldur í brotsteiginum, og Símun Joensen varð settur at skjóta brotssparkið:

- Eg ætlaði at senda bóltin upp í annað hornið, men eg rakti ov nógv undir bóltin, sum fór langt upp um málið. Tíbetur kostaði hetta ikki stig. Tað hevði ikki verið sambært leikgongdini, um vit høvdu mist stig. Vit høvdu hugburðin frá 2. hálvleiki í Fuglafirði við okkum, og tað var hugaligt, at stríðsvilji og hugflog í 2. hálvleiki gingu upp í hægri eind, heldur brotssparksskjúttin, sum plagar at vera tryggur úr ellivu metrum.

## Málini

Tey bæði fyrstu málini – tá ið B71 legði seg á odda, og tá ið KÍ javnaði – mintu nógv um hvørt annað og stóðust bæði av stórum mistøkum: Tummas Pauli Olsen, sum var einsamallur heilt á B71 toppinum, skoraði eftir langt útspark framum KÍ verjuna, og tá ið Rodrigo javnaði, var tað eftir framlegging frá Harley Bertholdsen úr høgru. Tríggir gulir vóru kring brasiliumannin, sum kortini fekk loyvi at gerast leysur og av brotsteigarmarkinum at smekka inn við handara stólpanum.

Miðverjin Ovi Nysted, sum eftir steðgin fór skaddur av vøllinum, var meistari fyri sigursmálinum. Úr 22 metrum sendi hann fríspark dygst inn við stólpanum. Skotinum bilti einki, men spurningurin er, um tað í hesum førinum kann sigast tað sama um verjupartin hjá B71.

- Við leiðslumálinum komu vit í ynskistøðu. Men stórt verjumistak oyðilegði ta støðuna fyri okkum, og uppgerðin av málmøguleikum boðar frá, at tað var lítið veiggj í okkum í 2. hálvleiki, var staðfestingin hjá sandoyingum, tá ið teir saman við trúgvu áskoðarunum, ið fyrstu løtuna høvdu havt tað heilt gott, fóru úr aftur Klaksvík, har líkindini høvdu verið góð fyrstu løtuna, áðrenn tað øtlaði eitt sindur. Men veðrið hugsaðu sandoyingar neyvan um, tá ið teir fóru um ella ræ ttari undir Leirvíksfirði.

EB/Streymur-Víkingur 3-1 (2-1):

# EB/Streymur basti víkingunum

*EB/S*

*Víkingur*

**Heima við Margáir vann EB/Streymur trygt 3-1 á Víkingi. EB/Streymur hevur enn ikki tapt í ár, og liggja teir nú á einum deildum fyrsta plássi**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Líkindini at spæla fótbólt mikukvøldið vóru góð, og nógvir áskoðarar vóru møttir upp við Margáir til dystin. Víkingur stríðist framvegis við at fóta sær í Formuladeildini, meðan trýstið heldur var størri á heimaliðnum, sum væntast at stríðast heilt frammi í deildini í ár.

## Heimaliðið hvassari

Dysturin byrjaði javnur, har bæði liðini fingu spælið at koyra væl. Tað kom tó sum ein hvøkkur hjá heimaliðnum, tá ið Egil á Bø longu tíðliga í fyrra hálvleiki mátti av vøllinum við skaða. Í hansara stað kom ein væl upplagdur Marcell Balog, sum var væl við frá byrjan av. Góða og framrættaða spælið førdi við sær, at eitt mál tóktist at vera ávegis. Hetta kom eisini tá ið lítið korter var leikt, og var tað nýggi leikarin hjá EB/Streymi, Høgni Zachariasen, ið skoraði hetta.

Víkingur hevði lítla yvirvág í spælinum, men heldur at teir megnaðu at javna, var tað heimaliðið, ið økti um leiðsluna. Málskjútti var Arnbjørn Hansen, sum setti høvdið á eitt gott innlegg.

2-0 sá leingi út til at gerast hálvleiksstøðan, men stutt fyri hálvleik eydnaðist tað Víkingi at minka um munin. Víkingur fekk hornaspark, og eftir ein størri bardaga um bóltin í brotsteiginum, endaði alt við, at ein EB/Streym-ari beindi bóltin í egið net. Hálvleiksstøðan var tískil 2-1 til EB/Streym.

## Lítil og eingin ivi

Í seinna hálvleiki vísti heimaliðið góðan álopsfótbólt, og teir vístu eisini, at teir eiga nógvar góðar bóltspælarar. Levi Hanssen vísti seg sum ein góðan spældeilara, og vongspæl varð eisini nógv nýtt. EB/Streymur hevði gott tamarhald á støðuni, og eitt korter fyri leiklok fingu teir málið, ið avgjørdi dystin. Hans Pauli Samuelsen fangaði bóltin í feltinum, og við hansara triðja landskappingarmáli gjørdi hann tað til endaligu støðuna, sum harvið gjørdist 3-1 til EB/Streym.

Fulla úrtøkan sendur steypavinnararnar úr Sundalagnum á eitt deilt fyrsta pláss við HB. Víkingur liggur mitt í deildini, har teir hava seks stig fyri fimm dystir.